# Rokna við framgongd fyri toskin

**Norðmenn og russarar frøast um óvæntað stórar mongdir av yngli, serliga hýsu, sild og svartkjafti; samstundis spáar Fiskirannsóknarstova n framgongd í tí føroyska toskastovninum.**

FISKIVINNA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Norskir miðlar siga frá óvæntaðum og dramatiskum vøkstri av fiskayngli í Barentshavinum við ávísing til norska og russiska havgransking. Sum skilst er talan um eitt metár hjá hýsuni sum ongantíð áður er skrásett við so nógvum yngli; samstundis bendir alt á at sildastovnurin av álvara er á veg upp, meðan svartkjafturin stendur í stórum mongdum í vestara parti av Barentshavinum.

»Norskir og russiskir havgranskarar hava funnið sensationellar mongdir av yngli av fleiri fiskasløgum í Barentshavinum,« skrivaði blaðið Fiskaren fríggjadagin. »Tann størsta sensatiónin er hýsa sum setir met fyri allar tíðir. Men sildin og svartkjafturin rópa somuleiðis eftir yvirskriftum...«

Talan er um fýra rannsóknarskip ið hava kannað ársins yngul yvir tveir mánaðir.

»Tað mest avgerandi er sannlíkt at vit í nullbólka stignum av norskari várgýtandi sild hava sæð eina gýting sum liggur á linju við stórár,« segði Harald Gjøsæter við Fiskaren aftan á ein norsk-russiskan granskarafund í Kirkenes í farnu viku, »samstundis sum 2002 árgangurin hevur møguleika at gerast líka stórur sum 1950 árgangurin, um so er at tøkan av sild í Norskahavinum í næsta ár vísir at ungsildin eisini har hevur ment seg víðari.«

Men hýsan vekir mest ans av øllum.

»Granskararnir hava aldri fyrr skrásett so nógvan hýsu yngul sum aftan á gýtingina í ár,« segði Gjøsæter. »Tað er so nógv sum kann henda millum ársyngul og fullvaksnan fisk. Men tá tað snýr seg um hýsu so hevur hon nú havt fimm góð ár á rað av rekrutering. Tað sum so leingi hevur verið vanligt fyri hýsu er at hon av og á hevur einstøk framúrskarandi ár, og so annars bara moderat. Nú hava vit havt fýra-fimm góð ár á rað, og so kemur hetta árið ið setir met fyri allar tíðir.«



*Toskurin vísir seg at fylgja gróðrinum, siga serfrøðingar, sum nú spáa framgongd fyri tann føroyska toskastovnin.*

*Savnsmynd*

Svartkjafturin hevur eisini klárað seg væl, skrivar Fiskaren.

»Hóast eitt enormt veiðitrýst tey seinnu árini, so standa stórar nøgdir av bæði stórum og smáum svartkjafti í bakkanum upp móti Bjarnoynni har vesturi í Barentshavinum.«

Sum skilst vekir toskayngilin ikki sama ans, hóast eisini her er talan um eitt ár sum liggur oman fyri miðal. Harafturin hevur fitt av upsa yngli verið at sæð í Barentshavinum.

»Vanliga hava vit ikki sæð nógvan yngul av upsa í Barentshavinum burtursæð frá einstøkum førum,« segði granskarin. »Men í ár hava vit sæð so nógv av upsa nullbólki at vit fyri fyrstu ferð hava gjørt index útrokningar fyri upsa yngul í Barentshavinum.«

Hinvegin vísir tað seg at standa verri til við lodnuni. Men kemur 2004 yngulin av sild at klára seg væl so kann roknast við at lodnan kemur seg aftan á nøkur ár. Men hetta er teori, tí í veruleikanum er tað ómøguligt at gera brúkbarar spádómar einans við støði í nullbólkinum.

## Kuldin kom ongantíð

Ikki óvæntað, frøddust feløgini hjá bæði fiskarum og framleiðarum yvir tíðindini um tann góða vøksturin av yngli í Barentshavinum.

»Hetta er bara positivt,« segði Reidar Nilsen, formaður í Norges Fiskarlag. »Hetta er góð tekin ið byggja víðari á ta positivu gongdina sum vit tey seinnu árini hava sæð fyri fleiri fiskasløg.

»Í uppisjóvar vinnuni mugu vit helst framhaldandi liva við útsvingum í sesongunum,« segði stórin í einari fiskivinnu fyritøku, »men innan botnfiskin er nógv at heinta.«

Tað verður spekulerað nógv um orsøkirnar til hetta óvanliga ár í Barentshavinum, og sum ein møgulig frágreiðing vilja summi peika á tann hækkandi temperaturin í sjónum, nakað sum fólk hava fest seg við í ár, í og við at ísurin er ikki komin líka langt suður sum hann plagar.

»Tað nervar meg ikki at yngulvøksturin í havinum kann standast av klimabroytingum,« segði Geir-Olaf Sørensen, Norges Kystfiskarlag. »Í 1930' unum var tað líka heitt í havinum sum tað er nú. Hetta kann líka so væl vera natúrligar svingingar sum nakað menniskjaskapt.«

Sørensen vildi halda seg aftur frá at harta havgranskararnar, men samstundis minti hann á at somu granskarar fyri fáum árum síðani spáddu niðurgongd í temperaturinum og ringar tíðir fyri tilgongdina av fiski í Barentshavinum.

## Fitnandi føroyskur toskur?

Á okkara leiðum hevur ikki ljóðað við sensatiónum av sama slag sum nú hoyrist av Barentshavinum, men Fiskirannsóknarstovan roknar við vaksandi toski her.

»Tær føroysku havleiðirnar svinga í einari aðrari takt enn Barentshavið,« segði Eilif Gaard, lívfrøðingur á Fiskirannsóknarstovuni.

»Vit gera metingar av gróðri so væl sum yngli og vit hava ábendingar um at toskurin er á veg upp. Toskurin vísir seg nevniliga í rættiliga stóran mun at fylgja gróðrinum, og skulu vit ganga eftir hesum so kunnu vit rokna við feitari toski og størri nøgdum.«

Sum fyrsta lið í føðiketuni, ávirkar gróðurin bæði tilgongd og vøkstur; hetta vísir seg at serliga endurspeglast í menningini av toskinum.

»Gróðurin í 2000 og 2001 var sera góður, men so var hann heilt niðri ígjøgnum í 2002.

Men síðani tá er gingið spakuliga og stútt uppeftir. Tí rokna vit við at í øllum førum toskurin er í ferð við at menna seg aftur.«



# Vantandi politisk undirtøka

**Hóast landsstýrismaðurin í skúlamálum hevur sett seks milliónir av á komandi fíggjarlóg til ein miðnámsdepil í Marknagili, so er ikki politisk undirtøka fyri ætlanini. Eitt nú hevur Kristian Magnussen í Javnaðarflokkinum at ætlanini**

MIÐNÁMSDEPIL
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, fer ikki í tingið við ætlanini um miðnámsdepil í Marknagili rættiliga enn. Hann ætlar at brúka meira tíð upp á at viðgera hana í samgonguni*

Miðnámsdeplin í Marknagili er nógv frammi fyri tíðina. Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, sigur seg hava kunnað allar flokkar á tingi um ætlanina, og at ætlanin er til politiska viðgerð enn.

Samstundis er greitt, at semja ikki er í samgonguni um, at júst hendan ætlanin skal setast í verk.

Kristian Magnussen, formaður í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum, sigur, at hann ikki dugdi at síggja tað fantastiska í hesari ætlanini, tí henni vantar ítøkiligar upplýsingar.

Jógvan á Lakjuni hevur gjørt av at seta seks milliónir av til ætlanina á komandi fíggjarlóg og 22 milliónir á einari langtíðarætlan fyri 2006.

– Málið er ikki liðugt polititiskt viðgjørt enn, og eg ætli eisini at viðgera tað meira í samgonguni, áðrenn eg fari í tingið við tí. Men viðgerðin skal helst verða liðug, áðrenn fíggjarlógin verður samtykt, sigur hann.

Jógvan á Lakjuni sær sjálvur nógvar møguleikar í miðnámsdeplinum. Hann vísir á, at tá fer so at bera til at nýta felagshentleikar so sum serstovur, kantinu, bókasavn og annað.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at rákið allastaðni er, at miðnámsskúlaskipaninar verða endurskoðaðar, og heldur hann, at jú fleiri fólk eru savnað í einum depli, jú fleiri møguleikar verða til tey ungu.

Hóast politisk undirtøka ikki er fyri ætlanini, so hevur landsstýrismaðurin sum sagt sett seks milliónir av til hana. Hann væntar, at um so ætlanin ikki vinnur frama í løgtinginum, so verða pengarnir standandi kortini.

— Øll vita, at tekniski skúli og studentaskúlin í Hoydølum treingja til betri karmar, og tað eru øll eisini samd um. Men tað er rætt, at ikki øll eru samd um hesa ætlanina at lata ein miðnámsdepil byggja í Marknagili, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í skúlamálum.



*Tjóðveldisflokkurin tekur fult undir við ætlanini um ein miðnámsdepil í Marknagili. Í tíðindaskrivi heitir flokkurin á landsstýrismannin um at fara í tingið við uppskotinum*

# Mugu hyggja frameftir

**Heidi Petersen, framsøgukvinna hjá Tjóðveldisflokkinum sigur í einum tíðindaskrivi, at Tjóðveldisflokkurin tekur undir við ætlanini um at gera ein miðnámsdepil í Marknagili. Hon leggur dent á, at tað ræður um at hyggja frameftir**

MIÐNÁMSDEPIL
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

– Vit hava sent hatta tíðindaskrivið út fyri at gera vart við okkara støðu, sigur Heidi Petersen.

Hon vísir á, at hetta arbeiðið byrjaði, meðan Tjóðveldisflokkurin umsat mentamál, og ræður tað um at fáa málið at koyra víðari, sigur hon.

Hon heldur fram, at flokkurin sær nógvar møguleikar í einum miðnámsdepli, har alt møtist.

– Tað ræður fyri alt í verðini um at hyggja frameftir, tá tað kemur til miðnámsskúlarnar, sigur Heidi Petersen.

Ætlanin um at gera miðnámsdepilin í Havn kemur at hava við sær, at eini 1.500 fólk verða savnað á einum staði. Men samstundis er greitt, at fiskivinnuskúlin í Vestmanna ikki verður ein partur av deplinum.

Tað undrast Kristian Magnussen, formaður í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum stórliga á. Hann spyr, hvussu tað ber til, at man vil byggja eina so lítla eind, meðan tað samstundis er so umráðandi, at allir skúlarnir í Havn verða kroystir saman í Marknagili, sum hann tekur til.

Til hetta sigur Heidi Petersen, at hendan ætlanin er við atliti til teir skúlarnar, sum eru í Havn. Har skal ongin skúli flytast úr einari bygd til Havnar. Hon dugir somuleiðis heldur ikki at síggja nakað til hindurs fyri, at Fiskivinnuskúlin kann koma við í hetta samstarv í framtíðini.

— Um so næmingar, sum ganga tað fyrsta árið á Fiskivinnuskúlanum, finna útav, at tey heldur vilja okkurt annað, so kunnu tey biðja um at verða flutt til Havnar. Og øvugt, sigur hon.

Ætlanin opnar nógvar dyr, heldur Heidi Petersen, og leggur dent á, at tað er umráðandi at hugsa um tað fakliga støðið.

- Vit hava hug at læsa okkum fast í, at tað er bara ein máti at taka miðnámsútbúgving uppá. Men tað er umráðandi, at vit kunnu tryggja fakliga støðið soleiðis, at tað lýkur fakligu krøvini, sum allur heimurin setur. Ikki bara donsku skúlarnir.

Heidi Petersen sigur seg annars hava skilt, at tað ikki eru allir limir í Javnaðarflokkinum, sum taka undir við sjónarmiðunum hjá Kristiani Magnussen.

–Tá man hevur tosað við aðrar limir í flokkinum, so er tað í øllum førum ikki tann fatanin, ein fær. So tískil er tað stórt spell, um ein einkultpersónur fer inn og setur seg ímóti hesi ætlanini, sigur Heidi Petersen.

# Saknar fakliga sjónarmiðið

**Kristian Magnussen, formaður í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum, sigur seg als ikki kunna taka undir við ætlanini um at gera miðnámsdepil í Marknagili. Hann eftirlýsir eina ítøkiliga lýsing av ætlanini og fer at krevja, at allir partar sleppa til orðanna í hesum málinum**

MIÐNÁMSDEPIL
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

– Hatta málið er ikki til nakra politiska viðgerð. Tað einasta, vit hava sæð, eru nakrar leysar skitsur yvir, hvussu tað møguliga kann koma at síggja út. Onki um innihald, pláss og so framvegis, sigur Kristian Magnussen.

Hann sigur, at hann fer at krevja av landsstýrismanninum, at málið verður lýst betur, og so vil hann hava eina hoyring um hetta málið, har allir partar sleppa til orðanna.

- Eg havi serliga saknað, at fakfólk sleppa at siga teirra hugsan, og at bygginevndin kemur við einari ítøkiligari frágreiðing um ætlanina, sigur Kristian Magnussen.

Hann vísir á, at pappír er takksamt, og at tað er lætt og einfalt at fáa ting at síggja gott út á pappírinum, men samstundis leggur hann eina við, at tá 1.300 fólk skulu koyrast saman í einum skúladepli, at tá má man hugsa seg um.

Kristian Magnussen heldur, at ein hoyring hevði gjørt tað, at man fær konfronterað ymsar meiningar við hvørja aðra og fingið eitt kjak burturúr, har allir partar í hesum sluppu fram-at.

Formaðurin í tingbólki Javnaðarfloksins heldur longu sum er, at studentaskúlin í Hoydølum við sínum 600 næmingum er ein nóg stór eind. Tá heldur hann, at tað kanska hevði verið eitt betri hugskot at sett fleiri av teimum smærru eindunum saman.

- Um tey mugu vera saman á einum staði í Havn, fyri at fáa tað rætta umhvørvið, hví so byggja ein fiskivinnuskúla í Vestmanna, spyr Kristian Magnussen.

Til tosið um at endurskoða miðnámsskúlaskipanina, sigur Kristian, at um hon skal endurskoðast, so má tað verða frá grundini av.

- Tað má tilrættisleggjast ordiligt, soleiðis at tað ikki endar við, at føroyskir miðnámsskúlanæmingar standa við einum prógvi, sum ikki lýkur krøvini aðrastaðni. Her tosa vit um álvarsmál, og tískil skilji eg ikki, at ein rektari, ( Sámal í Skoruni, blaðkv) kann úttala seg til útvarpið um, at miðnámsdepilin kann verða ein roynd av onkrum slagi. Men alt í alt, so haldi eg, at hesari ætlanini vantar nógv. Hon er ikki gjøgnum hugsað ella lýst nóg væl, staðfestir Kristian Magnussen at enda.



*Kristian Magnussen, formaður í tingbólki Javnaðarfloksins, sigur seg als ikki kunna taka undir við ætlanini um ein miðnámsdepil í Marknagili. Tað vanta ítøkiligir upplýsingar í uppskotinum, sigur hann*